November 2022

# Djóratrygging – Ross

*Skjal við upplýsingum um tryggingina*

Henda kunningin veitir ikki allar upplýsingar um djóratryggingina. Tá skaði er, eru tað fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú finnur nýggjastu tryggingartreytirnar á heimasíðu okkara www.betri.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600 og fáa nærri vegleiðing.

## Hvat slag av trygging er talan um?

Djóratryggingin fyri ross kann bæði fevna um eina djóralívstrygging og eina djórasjúkutrygging. Tú velur tær tryggingarnar, sum svara best til tín tørv.

### Hvat dekkar tryggingin?

Djóratryggingin er í tveimum. Tú kanst velja eina Djóralívstrygging og eina Djórasjúkutrygging um rossið er yngri enn 15 ár.

**Djóralívstryggingin fevnir um:**

- ✓ Tá rossið doyr av sjúku
- ✓ Tá rossið doyr av vanlukkutilburði
- ✓ Um rossið verður skatt undir flutningi í Føroyum
- ✓ Um djóralækni metir, at rossið má avlívast

**Djórasjúkutryggingin fevnir um:**

- ✓ Kanning og viðgerð av rossi hjá djóralækna í Føroyum
- ✓ Koyriútreiðslur hjá djóralækna
- ✓ Akuttir sárskaðar
- ✓ Kolikk
- ✓ Tannfraktur
- ✓ Heilivág, sum verður latin á staðnum og sum er neyðugur í sambandi við skaðan ella sjúkuna

### Hvat dekkar tryggingin ikki?

Her eru nøkur dømi um tað, sum djóratryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- x Sjúkur og skaðar, sum ikki eru nevnd í tryggingartreytunum
- x Fyribyrgjandi viðgerðir
- x Skaðar ella vanlukkutilburðir, sum ikki eru brádliga íkomnir
- x Um rossið verður avlívað uttan nakra medisinska grundgeving
- x Tá brot er framt á almennar forskriftir ella leiðbeiningar frá djóralækna
- x Skaðin er orsakaður av grovum ósketni hjá eigara, ella at rossið kom ov seint undir djóralæknahond

### Eru avmarkingar í dekningum?

Her eru nøkur dømi um avmarkingar í dekninginum. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- ! Endurgjaldið fyri djóralív minkar, tá rossið er yvir 19 ár
- ! Tryggingin fer úr gildi, tá rossið er 25 ár
- ! Tryggingin fevnir í mesta lagi um 3 skaðar um árið
- ! Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 10.000 fyri hvønn skaða

## Sjálvsábyrgd

Sjálvábyrgdin er kr. 1.000.

## Hvar dekkar tryggingin?

Tryggingin dekkar allastaðni í Føroyum og á ferðum uttanlands í upp til 3 mánaðir. Tó dekkar hon ikki undir sjóvegis flutningi millum lond. Djórasjúkutryggingin fevnir einans um viðgerðir hjá djóralækna í Føroyum.

## Hvørjar skyldur havi eg?

**Tá ið skaði hendir**

- Tú skalt boða okkum frá skaðanum skjótast gjørligt. Tað kann gerast á www.betri.fo, á tel 348 600 ella um kundaskipanina "Mín Trygging"
- Er rossið skatt ella sjúkt, skal djóralækni kanna tað skjótast gjørligt og møgulig viðgerð skal fremjast beinanvegin
- Er talan um stuldur, skal løgreglan á staðnum fráboðast
- Skal rossið avlívast, skal avlívingin verða framd av ella undir eftirlitið av útbúnum djóralækna
- Send okkum skjalprógv frá djóralækna, fyri viðgerð ella avlíving, skjótast gjørligt

**Tá ið broytingar eru**

- Tú skalt boða okkum frá, tá ið tú flytir bústað
- Skiftir rossið eigara, skulu vit hava boð um tað beinanvegin

## Nær og hvar gjaldi eg?

Tú kanst gjalda árliga ella mánaðarliga.
Gjaldast kann um sjálvvirkandi gjaldstænastu.

## Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi í eitt ár, um ikki annað er avtalað í tryggingarskjalinum. Hon heldur sjálvvirkandi fram, um hon ikki verður uppsøgd.

## Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tú kanst siga tryggingina upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

Somuleiðis kanst tú siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um tú gert tað innan 14 dagar eftir, at ein skaði er útgoldin ella avvístur.